Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Ferðastuðul

Spurningar:

1. Ætlar landstýriskvinnan at prístalsjavna ferðastuðulin?
2. Hvussu nógvir føroyingar pendla til og frá arbeiði meira enn 20 km dagliga?
3. Hvussu nógv % av teimum, sum pendla til og frá arbeiði, brúka hesa stuðulsskipan?

Viðmerkingar:

Nógvir føroyingar ferðast, eftir føroyskum mátistokki, langt til arbeiðis. Hvussu nógvir teir eru í tali, hevði verið áhugavert at vitað. Ferðastuðulin hevur ikki verið prístalsjavnaður síðan 2016. Hesi seinastu 8 árini er inflatiónin økt nógv. Olju- og bensinprísirnir eru vornir dýrari, umframt at avgjøldini eru hækkað.
Hetta ger, at ítøkiligi stuðulin er minkaður í virði. Pendlarar, sum koyra ella sigla langt til og frá arbeiði, hava tískil minni pening um hendi í dag. Ein javning av ferðastuðlinum kann tí verða neyðug. Fyri at fáa at vita, hvat landstýriskvinnan ætlar at gera, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 31. januar 2024

Jóhannis Joensen